## Málleyst hjá Claus

Einki mál kom í dystinum hjá Blackpool í næstbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Blackpool spældi á heimavølli ímóti Preston, og liðini fingu eitt stig í part burtur úr dystinum. Claus Bech Jørgensen var á liðnum hjá Blackpool allar 90 minuttirnar. Blackpool liggur sum nummar 15 av 24 liðum í Championship. Sjey dystir eru eftir at spæla.



## Málmaður fløsku í høvdið

Leygardagin fekk málmaðurin hjá Athletico Bilbao eina fløsku í høvdið undir dystinum ímóti Real Betis, og dysturin mátti steðgast. Málmaðurin Armando Ribeiro misti vitið eina løtu, og nú verður roknað við, at Betis fær harða revsing fyri tilburðin. Sannlíkt er, at eingir áskoðarar sleppa inn til næstu heimadystirnar hjá Betis í sponsku kappingini.

# Vinmenn eru nú móts

**Vinmenninir Jacob Larsen og David Edvardsen fylgjast nógv í gerandisdegnum, men hósdagin skulu teir stríðast um FM-gullið sum mótstøðumenn. Vit hava loddað dýpið hjá dønunum báðum, sum hyggja aftur á eitt eydnuríkt ár í føroyskum hondbólti**



HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Teir práta mest um hondbólt, tá teir eru saman í gerandisdegnum. Tað er heldur ikki løgið. Teir hava spælt á sama liði í Nykøping Falster í triðbestu deildini í Danmark, men hetta seinasta árið hava teir veruliga gjørt vart við seg í føroyskum hondbólti. Skírishósdag er tað tó sum mótstøðumenn, at teir skulu knógva hvørjum øðrum í fyrstu FM-finaluni í Høllini á Hálsi.

Serliga í hesum døgum fyllir hondbólturin nógv í huganum á vinmonnunum Jacob Larsen, úr Neistanum, og David Edvardsen, úr StÍF. Hóast tað, so vóru teir fúsir til eitt prát um finaluna og hetta seinasta árið. Fríggjamorgunin settust vit í Hvonn, og sum teir sjálvir byrjaðu samrøðuna við: - Tað, sum fer fram á vøllinum, verður verandi á vøllinum.

### Kappingarneytar

Tit spældu á liði saman í Nykøping Falster í triðbestu donsku deildini í 2006. Hvussu er tað nú at vera kappingarneytar um eitt gullheiðursmerki?

DE: Tað er stuttligt og spennandi. Æran stendur eisini upp á spæl. Æran um, hvør kann halda hvønn annan fyri gjøldur.

JL: Ja, nú eri eg eisini væl við Claus Rasmussen og Danni Syhler úr StÍF, so tað verður ein dystur í dystinum. Men eg eri sannførdur um, at eg standi ovast á skamlinum, tá heiðursmerkini verða býtt út.

### Persónslýsingar

Jacob, hvussu vilt tú lýsa persónin David Edvardsen?

- Fantastiskur fýrur. Vit finna væl út av tí, báðir. Hann er altíð glaður og ótrúliga lættur at vera saman við.

David, hvat vilt tú so siga um persónin Jacob Larsen?

- Hann er altíð glaður, tað leggur tú til merkist alt fyri eitt. Hann er hjálpsamur og hevur torført við at siga nei – sum mær eisini dámar væl. Hann er stillur og veit altíð eina góða søgu, um tað er.

Jacob, hondbóltsspælarin David Edvardsen – hvussu vilt tú lýsa hann?

- Tað er sera lætt at undirmeta hann, tí hann er so lágvaksin. Men tað mást tú ikki. Hann skjýtur væl eisini.

**FAKTA**

**Navn:** David Edvardsen
**Føddur:** 15. desember, 1986
**Felag:** StÍF
**Pláss:** Høgri bakkur
**Ættaður:** Danmark, Fredrikshavn
**Búsitandi:** Tórshavn

Eg ivist ikki í, at hann hevði staðið seg sera væl í næstbestu deildini í Danmark. Hann er uttan iva besti høgri bakkur í føroysku kappingini í løtuni. So vit mugu bara vóna, at hann spælur vongur móti okkum...

David, hvussu er málverjin Jacob Larsen?

- Ja, tú má so heldur ikki undirmeta hann. Verður skotið niðureftir, so veitst tú, at hann bjargar. Hann er kvikur á fótunum, og stendur verjan nøkunlunda, so verjir Jacob fyri tí, sum hann skal.

David, á hvørjum økjum skal Jacob Larsen menna seg?

- Hann hevur tað fyri at seta seg niður hvørjaferð, tað verður skotið á hann. Eg kann ikki reiðuliga hugsa um nakað annað.

Jacob, hvussu við David?

- Ja, tað er sikkurt atdráttarmegin, sum er orsøkin til tað. Men David? Nú siti eg og hjálpi honum her áðrenn finaluna, men líkamikið. Hann burdi skoti meira skiftandi. Hann fær altíð eina rúgvu av málum, ikki tað, men bólturin fer altíð í sama stað.

### Danirnir høvdu ávirkan

David, hví valdi tú at koma higar?

- Eg var ringdur upp eina viku, áðrenn landskappingin í Føroyum byrjaði. Claus (Rasmussen, venjari hjá StÍF, blðm.) hevur áður verið venjari hjá mær í Team Sydhavsøerne í Danmark. Eg og Danni Syhler kennast eisini væl, so teir ávirkaðu sjálvsagt mína avgerð. Teir manglaðu ein lám, og eg tók av alt fyri eitt. Eg metti tað verða eina stóra upplivingg, og soleiðis hevur eisini verið higartil.

Jacob, tú var her í farna kappingarári eisini?

- Ja. Eg og Kári Horn, sum spældi við Neistanum í fjør, eru væl og eg hevði ofta prátað við Claus, sum jú vandi Neistan tá. Eg vildi fegin royna okkurt nýtt og ókent, og hetta var ein upplagdur møguleiki. Eg havi so ongantíð iðra meg um